STARV sosialurin

# Blaðfólk til Eysturoyarredaktiónina

Til at røkja spennandi, avbjóðandi og fjølbroyttar arbeiðsuppgávur verður søkt eftir blaðfólki til Sosialin.

Talan er fyrst og fremst um at røkja uppgávur á Eysturoyarredaktión okkara í Saltangará og kring alla oynna. Men tað verða eisini uppgávur á hinum redaktiónunum hjá blaðnum kring landið her serstakliga høvuðsredaktiónini á Argjum umframt á rullandi redaktiónini.

Vit hugsa okkum, at tú skal byrja eftir summarfrítíðina, helst frá 1. í august. Møguleiki verður tó eisini at byrja fyrr.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist, og at tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, sum kann gerast títt, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341800. Ella at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 23. juni. Umsóknir við viðkomandi skjølum verða at senda til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**100 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

Sosialurin 341800

## Asfalteringsarbeiði til privat og vinnuligt

Alt asfalteringsarbeiði, so sum: Vegir, gongubreytir, parkeringsøki, tún og annað verður gjørt.

Tel 220179 Jóhannus Rasmussen
Tel 227910 Heri Jacobsen

Asfalt Sp/f
H.J. Asfalt

Gerðisvegur 12 • FO-660 Søldarfjørður • Faroe Islands

Sp/f H.J Asfalt • Fo-660 Søldarfjørður

Sosialurin 341800

## Viðfestivognar

Brenderup

Var mest seldi viðfestivognur í Føroyum í 2002.
Vit hava Føroya størsta og besta úrval av vognum á goymslu. Stórir, smáir, innilokaðir, vippuvognar, bátavognar, o.s.fr.

Vognar eru eisini á goymslu hjá Balslev í Havn, D.J. Enni á Tvøroyri og Klaksvikar Timburhandil.



Pf HANSEN
Telefon 44 71 42 - 21 85 40

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 13. juni 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 hevur góðkent:

**Betongblandistøð hjá P/F Løvubetong við Norðskála**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**Skipaeftirlitið**
*Fiskimálaráðið*

## Kunning um

### tilbúgving á skipum móti yvirgangsatsóknum

Eftir yvirgangsatsókningar móti World Trade Center hin 11. september 2001, eru nógv tiltøk sett í at fyribyrgja yvirgangsatsóknum. Altjóða sjóferðslufelagsskapurin IMO hevur lýst trygdartiltøk fyri skip og havnir í SOLAS konventiónini, kapitul XI. Hvussu hetta skal gerast er staðfest í »International Ship and Poirt Facility Security Code« (ISPS kotuni). ISPS kotan skal verða sett í verk hin 1. juli 2003. Øll farmaskip yvir 500 BT og allar havnir, har farmaskip í uttanlandssigling koma, skulu lúka ávís krøv. Harumframt skal altíð greiða verða á hvat er í bingjum og trailarum, ið verða útflutt.

Møguligar avleiðingarnar av at krøvini í ISPS kotuni ikki verða lokin kunnu verða, at skip fáa trupulleikar tá tey koma í fremmandar havnir, bingjur og trailarar kunnu fáa truplleikar.

Til tess at kunna um ISPS kotuna, hvørji krøv ið verða sett til skip, havnir og útbúgvingar ið krevjast til at umsita kotuna, bjóðar Skipaeftirlitið øllum áhugaðum til fundar á Føroya Sjómansskúla fríggjadagin hin 20. juni 2003 klokkan 14.00

**Skipaeftirlitið**

## Hjálparfólk

Søkt verður eftir hjálparfólki at byrja 18. aug. 2003.

Starvið umfatar m.a. viðlíkahald av goymsluni, reingerð av hillunum í avgreiðsluhølinum og í kjallaranum, ganga ørindi, avgreiða postpakkar, hava ábyrgd av matstovuni og annað fyrifallandi arbeiði.

Arbeiðstíðin er mánadag frá kl. 8.30-17.30 týsdag-fríggjadag frá kl. 8.30-15.00.

Løn sambært lønarsáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal vera Apotekinum í hendi áðrenn 14. juli 2003.

**Eysturoyar Apotek**
Mýravegur 6
Boks 97
Runavík

## Tvøroyrar Býráð

Kort við uppskotum til gøtunøvn hanga frammi á býráðsskrivstovuni til 1. okt. 2003. Møguleiki er hjá almenninginum at koma við broytingaruppskotum.

**Tvøroyrar Býráð**

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar
Tíðindi Viðmerkingar
Ítróttur Nøvn Skráir

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Ørindagenta/-drongur

Søkt verður eftir ørindagentu/-dreingi til skrivstovuna í Havn. Tað er ynskiligt, at tann, ið settur verður, kann byrja sum skjótast. Arbeiðstíðin verður vanliga frá kl. 8-13, men roknast kann við, at viðkomandi skal avloysa fulla tíð (8-16) á móttøkuni í summarfrítíð stovnsins, t.e. frá 21. juli-18. august 2002.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðheitum um innan- og uttanhýsis ørindi, avloysing á móttøkuni við telefon, posti og annað fyrifallandi arbeiði fyri skrivstovuna.

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir ungum fólki við students-, HF- ella HH-prógvi, og sum ætlar sær at fara undir víðari útbúgving um eitt ár ella so. Fólk, sum verða liðug við próvtøkuna í ár, kunnu eisini søkja.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 23. juni 2003. Merkið brævbjálvan »Umsókn eftir ørindafólki«. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 311333 og tosa við Levi Hentze.

## Hús til sølu á Tvøroyri



Hús 55 m² í trimum hæddum.
Grundøki 355 m².
Privat parkeringspláss.

**Áhugað kunnu ringja 371980**

## Aðalfundur

Aðalfundur verður á Suðuroyar Kunningarstovu leygardagin 5. juli 2003 kl. 13.00.

**Suðuroyar Kunningarstova**

## Edv-starvsfólk

Søkt verður eftir einum starvsfólki til edv-deildina hjá politinum at arbeiða fulla tíð (38 tíma viku) frá 1. juli 2003 at rokna ella skjótast tilber eftir henda dato.

Vanliga arbeiðsstaðið er politistøðin í Havn, men roknast kann við uppgávum á hinum tænastustøðunum eftir tørvi. Umframt Havnina er talan um politistøðina í Klaksvík, Runavík, Vestmanna, Miðvági, Sandi og á Tvøroyri – ella 11 ymisk støð við samanlagt gott 100 starvsfólkum.

**Førleikakrav:** Tú skalt vera við til at umsita edv-útgerðina, fremja brúkaraadministratión, system-administratión, umsita e-post, røkja Meridian-telefonskipan v.m. Forritini Windows 98, -2000, -NT, MS Office og Exchange verða brúkt. Nakað av førleika til UNIX minidatamat er ein fyrimunur, men ikki nakað krav.

Tú skalt bæði kunna arbeiða saman við øðrum og sjálvstøðugt.

Hevur tú áhuga í hesum arbeiði, góð samstarvsevni, neyðuga útbúgving og/ella verkligan førleika vænta vit at hoyra frá tær.

Øll eru vælkomin at søkja, uttan mun til kyn, átrúna ella etniska støðu.

Lønar- og setanarviðurskifti samsvarandi avtalu millum danska fíggjarmálaráðið og viðkomandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Sóley í Selvindi, tlf. 35 14 48 lok 5555.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum – og har tú setur fram tíni lønarkrøv – verður at senda til: Føroya Landfúti, Postboks 3018, FO-110 Tórshavn, innan 24. juni 2003.

**Føroya Landfúti**

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
**Telefon +298 312973 - Telefax + 298 318624**

Søkt verður eftir

## hjálparfólki til kantinuna

Tað verður lagdur dentur á, at tann, ið sett/ur verður er røsk/raskur, álítandi og nærløgd/lagdur í sínum arbeiði. Tað er ein fyrimunur, um tú ert von/vanur við køksarbeiði.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Arbeiðstíðin er hvønn gerandisdag frá kl. 8.30 til 15.00 teir dagar tá skúlagongd er.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til skúlan.

Umsóknir skulu verða rektaranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 19. juni 2003.

## Pedagogar

Søkt verður eftir 3 pedagogum 34 t., 2 pedagogum 30 t. og 4 pedagogum 24 t. um vikuna, at byrja 11. august 2003.

Dr. Margrethu Barnagarður er normeraður til 94 børn í aldrinum 0 til 7 ár sum eru bólkaði soleiðis:

1 vøggustova á 10 børn í aldrinum 0 til 3 ár. Til hesa stovu søkja vit eftir 1 pedagogi á 30 t.v.

3 barnagarðsstovur á 21 børn í aldrinum 3 til 5/6 ár. Til hesar stovur søkja vit eftir 2 pedagogum á 34 t.v., 1 pedagogi á 30 t.v. og 3 pedagogum á 24 t.v.

1 forskúlastovu á 21 børn í aldrinum 6 til 7 ár. Til hesa stovu søkja vit eftir 1 pedagogi á 34 t.v. og 1 pedagogi á 24 t.v.

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er, at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

**Tann ið settur verður skal hava:**

- Góð samstarvsevnir
- Vera kreativ/ur
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum
- Hava ábyrgdarkenslu.

Vit vænta at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønarstig 9.

Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Umsóknir saman við avritum av prógvi og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. juli 2003.

Meira fæst at vita við, at venda sær til leiðaran Marjun Lassen á tlf. 455557 lokal 10.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
FO-700 Klaksvík

## Gøtu Skúli søkir eftir lærara

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv til skúlaárið 2003/2004.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 25. juni kl. 14.00.

Um nærri upplýsingar ber til at venda sær til fyrstalæraran á tlf. 441059 ella formannin í skúlastýrinum tlf. 441614.

**Gøtu Skúlastýri**
v/ Maria Gregersen
510 Gøta